## DAGSINS MEINING

# Vit høvdu bara væntað okkum meira

Tað má verða hart, tá man verður misskiltur av allari verðini, men kanska eigur man tá at steðga á, um tað ikki fyriheldur seg øvugt, nevniliga, at man sjálvur hevur misskilt alla verðina. Um man ikki visti betur, so kundi tað sæð út sum fullkomið mangul uppá sjálvrannsakan, tá man roynir at fáa eitt heilt óproduktivt stríð um orðadefinitiónir og spæl fyri gallarínum at síggja út sum størri úrslit enn tey, allir føroyskir fólkatingslimir hava avrikað seinastu 25 árini. Ein uttanfyristandandi kundi enntá farið so langt sum at sagt, at hetta var mangul uppá realitetssans og óbeskeðinheit út um alt mark.

Nú er tað ikki rætt, sum Høgni Hoydal sigur í viðmerking, at vit her á hesum stað altíð eru eftir Tjóðveldisflokkinum – tað man valdast um eyguni, sum síggja. Tá vit so skriva um Tjóðveldisflokkin eitt nú í samband við samgonguna við Miðflokkin, so er tað tí, at vit høvdu væntað okkum meir av hesum flokki.

Tá Fólkaflokkurin gerst kreativur við kvotum ella sendir Landsverkfrøðingar til hús, so eru tað ting, ið vit altíð vilja átala, men innast inni, so hava vit ongantíð væntað nakað serligt av hesum flokki, ið altíð hevur staðið fyri fjálgan av teim fáu. Tá nú Miðflokkurin luftar sítt trongskygni, so kemur tað ikki óvart á, at høgrakreftirnar í Fólkaflokkinum tykjast taka undir við bíbliutulkingarmonopolistunum. Tá Tjóðveldisflokkurin við formanninum á odda so situr og bítir alt í seg fyri at halda krampaktugt fast um heimastýrissamgonguna, ið vit hava, so tala vit at. Tað gera vit, tí Tjóðveldisflokkurin var ein progressivur flokkur, ið mangan var ein góður allieraður hjá Javnaðarflokkinum, tá tøk skuldu takast á framburðsleið. Hann var altíð ein góður stuðul, tá mál skuldu yvirtakast og ikki minst, tá man undir Javnaðarløgmanni fekk sjómarkið útflutt og fekk yvirtikið undirgrundina. Tjóðveldisflokkurin taldist eisini millum verkamannaflokkarnar á tingi, og var hann eisini ein flokkur, ið borgaði fyri framburði og vardi minnilutar í samfelagnum. Hvør minnist ikki markanta profilin hjá flokkinum í málum viðvíkjandi javnstøðu og kvinnurættindi? Hvussu er í dag? Er tað løgið, at progressivar kreftir í Føroyum gerast vónbrotnar, tá Tjóðveldisflokkurin í so stóran mun letur seg buka uppá pláss av Miðflokkinum og Fólkaflokkinum?

Ikki eru tað bert oddagreinirnar í Sosialinum, ið hava at Tjóðveldisflokkinum, hesum viðvíkjandi. Mong eru tey, ið øtast – eisini í Tjóðveldisflokkinum. Í hesi viku var ein sera vælskrivað grein av einum skilamanni í bløðunum, ið hevur svar uppiborið. Hvat sigur formaður Tjóðveldisfloksins eitt nú til spurningin, um hann hevur gjørt avtalu við Miðflokkin frammanundan? Vónandi tekur Tjóðveldisflokkurin gamla progressiva skinnið um bak aftur og viðgongur, at her ruggar ikki rætt í Føroyum í dag, tá bíbliutulkingarmonopolistarnir svinga dirigentpinninum og samgongan dansar til taktina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Øssur Dam Jacobsen og fólkatingið

**Høgni Hoydal**



Góði Øssur Dam Jacobsen.

Síggi, at tú hevur eitt heldur háðandi innlegg í bløðunum, um fólkatingsarbeiðið hjá umboði Tjóðveldisfloksins. Tú hevur allan rætt til at finnast at tí arbeiði, ið verður gjørt á danatingi. Men grundgevingarnar tykjast mær vera tiknar úr leysum lofti og bygdar á fordómar og skeivleikar.

Hetta kenst næstan sum at lesa oddagreinir í Sosialinum, har ókvæmisorð um Tjóðveldisflokkin og útleggingar av, hvat Tjóðveldisflokkurin eigur at gera og halda, er nærum einasta politiska evnið. Løgið kortini, at tú og Sosialurin ongantíð viðgera úrslitini av fólkatingsumboðanini og politikkinum hjá tykkara egnu flokkum, fólkaflokkinum og javnaðarflokkinum.

Tá tú tosar um knæfall fyri Nyrupi, so hugsi eg, at talan má verða um okkurt slag av sjálvspeii hjá tær mótvegis tínum egna flokki.

**Valskráin hildin til punkt og prikkar**

Tað er beinleiðis skeivt, tá tú sigur, at Tjóðveldisflokkurin ger nakað annað, enn tað, hann fór til val uppá.

Tjóðveldisflokkurin fór til val uppá at vera ein óheft, fræls og føroysk rødd á danatingi. Ein rødd fyri føroyska sjálvstýris- og fullveldisstríðnum. Ein rødd, sum ikki druknaði í donskum flokkum og donskum partapolitikki.

Endamálið var at nýta fólkatingsessin sum ein pall til tess at upplýsa, kunna um og stríðast fyri føroyskum tjóðarrættindum. Fyri sjálvsavgerðarrættinum, ognarrættinum og málsligu/mentanarligu rættindunum hjá føroysku tjóðini. (Um tú hevur hug, kanst tú fá eitt eintak av valskrá Tjóðveldisfloksins til kunningar.)

Hetta endamál er hildið til fulnar. Ja, til punkt og prikkar. Norðuratlantsbólkurin er skipaður saman við grønlendsku fólkatingsumboðunum, og setningurin hjá bólkinum er nærum orðarætt tann sami sum valskrá Tjóðveldisfloksins.

Bólkurin er óheftur av øllum donskum flokkum og partapolitikki - og hvør limur hevur annars sítt fulla frælsi at reisa tey mál, hann ynskir. (Sí heimasíðuna www.nab.fo.)

**Valtekniskir bólkar ikki politisk binding**

Longu eftir fólkatingsvalið gjørdi Norðuratlantsbólkurin tekniska valsamgongu við andstøðuflokkar á fólkatingi um nevndarval.

Hetta er púra sjálvsagt. Tjóðveldisflokkurin hevur eisini gjørt tekniska valsamgongu um nevndarval við Sambandsflokkin á Løgtingi fleiri ferðir. Tað merkir ikki, at nakar er politiskt heftur av tí og harí liggur ongin politisk binding av nøkrum slag. Tað átti tú at vita, sum fyrrverandi løgtingslimur.

**Nevndarsessir onki prinsippmál**

Henda tekniska valsamgonga gav longu í fjør Norðuratlantsbólkinum nakrar nevndarsessir. Og longu tá umhugsaði undirritaði, um gagn fyri føroysk tjóðarrættindi kundi fáast burturúr umboðan í týdningarmiklum nevndum.

Eg helt tó, at vit áttu ikki at gerast limur í tí serliga Føroya-bólkinum, tí hann er eitt slag av "alibii" hjá donsku stjórnini í føroyapolitikkinum - og við at gerast limir har, góðtóku vit henda alibi-politikk.

Viðvíkjandi øðrum nevndum áttu vit at bíða og meta um royndirnar og støðuna, og tí umboðaðu grønlendsku fólkatingslimirnar okkara bólk í øðrum nevndum fyrstu setuna.

Longu fyri jól í fjør, gjørdi núverandi fólkatingsumboðið, Torbjørn Jacobsen alment vart við, at hann helt, at nevndarumboðan átti at umhugsast, tí har kunnu spurningar setast, ráðharrar kallast inn o.a., sum ikki er so lætt í fólkatingsalinum. Serliga varð hugsað um Uttanríkisnevndina, Verjunevndina og Politiskt-búskaparligu nevndina, har mál verða viðgjørd, ið burturav hava við føroysk rættindi at gera.

**Setningurin hildin**

Torbjørn Jacobsen hevur nú tikið avgerð um at fara í tvær av hesum nevndum. Tað er hansara suverena val - bert hann ikki gerst partur av donskum innanríkis- og partapolitikki, sum flokkurin hevur samtykt.

Eg eri vísur í, at hann megnar at røkja valsetning Tjóðveldisfloksins í hesum arbeiði. Og tað er ein himmalvíður munur á hesum og at umboða ein danskan flokk í eini nevnd, soleiðis sum Lisbeth L. Petersen hevur valt at gera.

Eg dugi ikki at svara tær uppá, hví fleiri fjølmiðlar og tú sjálvur hava lagt hetta út sum brot á eitt prinsipp hjá Tjóðveldisflokkinum.

**Meira av skafti enn seinastu 25 árini**

Hesir fyrstu tíggju mánaðirnar hava sannført meg um, at longu nú er meira komið av skafti á Fólkatingi til frama fyri føroysk áhugamál enn seinastu 25 árini. Uppá 10 mánaðir er meira kunnað, fleiri fyrispurningar og fleiri uppskot sett fram, enn bæði tey undanfarnu umboðini settu fram alt valskeiðið seinast.

Ert tú ósamdur í hesum, og kanst vísa á úrslitini á fólkatingi hjá tínum egna flokki til frama fyri føroysk rættindi,seinastu 17 árini, so lurti eg fegin.

# Langur leygardagur í SMS

SMS
*Tíðindaskriv*

Komandi leygardag hevur SMS opið til kl. 17.00. Upprunaliga skuldi hesi langi leygardagurin havt verið 28. september, men av tí at umbyggingin ikki var liðug, var loyvi givið SMS, at flyta til nú leygardagin.

Í hesum sambandi hava handlarnir í SMS nógv góð dag- og tímatilboð. Hesi verða lýst á heimasíðuni hjá SMS, www.sms.fo, og í faldarum í húsinum leygardagin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Danatingið og republikanararnir

### Tjóðveldið farið í tekniskt samstarv við Nyrup og co.

**Øssur Dam Jacobsen**

Fyri ári síðani var val til danating. Tjóðveldið avgjørt sum altíð. Ikki talan um at blanda seg í danskan politikk, so eiðasørt – og so skuldi bert tosast føroyskt, ein mergjað tjóðveldisrødd var svarið. Nú var slutt við donskum leigusveinum. Nú var slutt við at sleikja danska koyrilin hjá Nyrup.

Og væl bar til.

Sjálvur garanturin fyri fólkarepublikkini fekk sæti í hjartanum í kolinimaktini. So nú var lag á manni.

Brotið varð upp um ermar – norðatlantsbólkurin gjørdist mergurin í loysingini. Saman við grønlendskum sosialistum nú samanrenningin av íslendskum sosialistum og gomlum kommunistum skulu koloniveldi danska setast á pláss.

**Men** lekur ikki millum teori og praksis?

Fyrsta umboðið gjørdi, var at gera knæfall fyri donsku grundlógini. Váttaði við egnari hond, at lógin var alra ríkisins.

Síðani at skipa bólk við grønlendingum at fáa sum mest úr danska statskassanum at fíggja egið politiskt virksemi.

Men…um dagarnar bar av.

Nú frættist, at garanturin fyri fólkarepublikkina var farin í valbólk á danatingi. Og ikki við hvørjum sum helst – donskum sosialdemokratum (Nyrup), sosialistum (SF), gomlum kommunistum (Eindarlistanum) og annars politiskum opportunistum. Nú er Nyrup av øllum vorðin trygdin fyri republikanskari ávirkan á danatingi! Nyrup er nú trygdin fyri, at republikanska umboðið sjálvt kann skýra seg at gerast politiskur stuðulspædagogur á danatingi (ÚF, sambært umboðnum). Hetta eru teir, sum ikki skuldu blanda seg í danskan politikk?!

Men hetta er kanska fremjanin av treytaleysum nærlagni og klokkuklárum mannagongdum, sum tjóðveldið hevur tikið patent uppá?

Onnur ivast og sanna, at ofta etur hundur tað, hann sjálvur drítur.

# Til landsstýrismannin í heilsumálum, Bill Justinussen

Á felagskommunalum fundi á Sandi tann 3. okt. 2002 samtyktu borgarstjórarnir at senda skriv til myndugleikarnar viðvíkjandi læknaviðurskiftunum í Sandoyar læknadømi.

**Borgarstjórarnir vilja harðliga átala at læknaviðurskiftini eru blivin heilt út av lagi vánalig og ótrygg.**

Vit hava havt ein danskan læna her síðan 4. mars og hevur hann sitið einsamallur við vakt alt samdøgurið í 6 mánaðir. Hann hevur havt frí eina viku nú frá 23. til 29. sept., tá avloysari bleiv settur og hann skuldi so byrja aftur 30. sept., men møtti ikki upp. Vit hava hoyrt, at hann kemur aftur í næstu viku, og vit hava ligið uttan lækna í fleiri dagar.

Fólk í læknadøminum eru sera ótrygg og illa nøgd við verandi lækna, tað sæst eisini á tí stóra hópi, ið má søkja læknahjálp í Havn.

Eftir at hava viðgjørt støðuna og tikið samanum, meta vit at støðan er so ótrygg við verandi lækna, at rættast er at hann verður loystur úr starvinum.

Vit hava ikki nakra loysn uppá, hvussu læknatrupulleikin í Sandoynni kann loysast, ein møguleiki kundi verið at sett eina skiftisskipan á stovn, soleiðis at kommunulæknar aðrastaðni frá kundu arbeitt eina viku í senn í Sandoynni, men sjálvsagt vita vit ikki, um hetta letur seg gera.

Vónandi verður hesin trupulleikin tikin upp á hægsta stað og ein loysn funnin, so fólk kunnu kenna seg trygg í læknadøminum.

**Jóhan Petur í Soylu**
**borgarstjóri, Sandi**

**Hanus undir Leitinum**
**borgarstjóri, Húsavík**

**Gerhard Lognberg**
**borgarstjóri, Skopun**

**Torbjørg Djurhuus**
**Skálavíkar Kommuna**

**Jóhan Hentze**
**borgarstjóri, Skúvoy**

avrit er eisini sent til: Landslæknan, løgtingsmenninar fyri Sandoynna og Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann

# »Wanna-Be-kapping« á Torginum í SMS



SANGKAPPING
*Tíðindaskriv*

"And through it aaaaaaaaal, she offers me...." - sang Jens Marni í sjónvarpinum. Og hann kláraði seg stak væl, sjálvt um hann ikki líktist Robbie Williams sum so. Sangkappingar eru vældámdar fyri tíðina. Nøkur koma langt við røddini, onnur ikki.

Á Torginum í SMS verður í døgunum 25.-26. oktobur ein eitt sindur øðrvísi kapping; ein Wanna-Be kapping. Í orðagreipuni liggur týdningurin »vilja vera sum…«, og her er tað ikki sjálvur sangurin, ið verður í hásætinum.

Harafturímóti snýr kappingin seg um at líkjast einumhvørjum sangfugli ella – bólki so mikið, sum yvirhøvur til ber.

Ein pallur verður settur upp, og luttakarin fær síðan høvi at vísa síni kynstur framman fyri dómarum, ið til dagliga hava sítt yrki innan tónleikaheimin.

Fyrra dagin er undanumfarið, og síðan verður finalan dagin eftir. Til ber at melda seg til á heimasíðuni hjá SMS, og harafturat verður meira at lesa um kappingina í einum blaðið, ið SMS gevur út í døgunum 7.-8. oktobur.

Viðmerkjast skal, at ávísar treytir verða settar. Tær eru m.a. at luttakararnir ikki mugu vera eldri enn 15 ár og at í mesta lagi 5 luttakarar kunnu verða í einum bólki. Verða tað fleiri, sum ynskja at framføra sum sama songstjørna ella bólkur, kunnu vit velja ímillum hesi.

Tað ræður um at gera skjótt av, tí luttakaratalið verður avmarkað. Tað eru SMS, Pepsi og Føroya Sparikassi sum í felag skipa fyri kappingini.

# Helga formaður í Listastevnustýrinum

**Martin Næs er nývaldur í stýrið fyri Listastevnuna. Umboðsráðsfundur var í síðstu viku**



LISTASTEVNAN
*Tíðindaskriv*

Umboðsráðsfundur var í Listastevnu Føroya 1. oktober. Á skránni var regluligt skifti í formansskapinum, eins og val av nýggjum limi í stýrið fyri Listastevnuna.

Í Umboðsráðnum fyri Listastevnu Føroya eru umboð fyri: LISA, Felagið Føroysk Tónaskøld, Felagið føroysk Myndlistafólk, Leikarafelag Føroya, Leikpallur Føroya, Føroya Blaðmannafelag, Rithøvundafelag Føroya, Arkitektafelag Føroya, Kórsamband Føroya, Føroya Tónleikarafelag, Føroyskir Yrkisfotografar, Dansifelagið Sláið Ring, Listasavn Føroya, Føroya Symfoniorkestur, Føroya Fornminnissavn, Føroya Landsbókasavn, Fróðskaparsetur Føroya, Stýrið fyri Norðurlandahúsið og Tórshavnar Býráð.

Hetta farna skeiðið hevur Tórshavnar Býráð havt formansskapin. Nú er formansskapurin aftur í Norðurlandahúsinum, soleiðis at Karin Kjølbro, sum er formaður í Stýrinum fyri Norðurlandahúsið, nú er formaður í Umboðsráðnum fyri Listastevnu Føroya. Samstundis verður stjórin í Norðurlandahúsinum Helga Hjörvar formaður í Listastevnustýrinum.

Á skránni fyri Umboðsráðsfundin var eisini val av einum limi, at umboða Ráðið í Stýrinum. Valdur varð Martin Næs, landsbókavørur og rithøvundur.

Varamaður hansara gjørdist Martin Mouritsen, Musikkskúlaleiðari.

Í Stýrinum fyri Listastevnu Føroya sita nú: Helga Hjörvar, formaður, Birgir Kruse, næstformaður, Jenny Petersen og Martin Næs.

Listastevnan 2003 verður hildin í døgunum 7.-17. august. Samskipari er Oddvá Nattestad.

# Ferðin

*Frá móðurlívi úr vøggu*
*Fram á gólv at grulva*
*Tey fyrstu fet eg stetlaði har*
*Ein ferð varð byrjað mín ferð*
*Ferðin frá vøggu til grøv*
*Var tað alt? Er tað alt?*
*Svarið visti eg alla tíðina.*

*Ferðin er longur enn tað*
*Eisini í deyðans svøvni*
*Ferðin røkkur heim í Himmalin*
*Har seta vit okkum at rinda møðina*
*Har hvíla vit um ævir glað.*

*Ferðamaður á tíni lívsins ferð*
*Far so vakurt og hóvliga har*
*Treða skalt Himins gøtu smølu*
*Á tíni jarðarleið snávar ei*
*Ein er ið ljósins vegin vísir*
*Eitt andarhald so ert tú har*
*Tíni kæru tú har aftur sær.*

*Á bønarveinjum ferðin gár*
*Úr móðurlívi í ellini ár mong*
*Heim at prísa Himins kong*
*Hoyr rødd hans sæla tá*
*Kom heim kom heim barn.*

**Eyðálvur Kári Nielsen**